## HEILSANIR



**Góða mamma og omma**
Hjartaliga tillukku við døgunum t. 15. og 24. juli. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja vit í Fuglafirði og í Odense**



**Góði abbi og langabbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 17. juli.
**Kærar heilsanir Fríði og Mads**



**Góða mamma og pabba**
Hjartaliga tillukku við 20 ára hjúnabandsdegnum. Alt tað besta í framtíðini. Vit elska tykkum.
**Ynskja tykkara 4 døtur**



**Góða Bára og Búgvi**
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini ynskja vit øll
**Hans Pauli og Sunniva**



**Góði fitti Frank**
Hjartaliga tillukku á 2 ára føðingardegnum. Her vart tú sterkur. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskja gubbi, Tania, Bjartur, Djóni og Marni**



**Góða Hildur**
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum.
**Heilsan mamma, babba og Páll**



**Góða fitta Edna omma**
Hjartaliga tillukku við degnum sunnudagin.
**Heilsan Anja, Silja, Edna, Kári, og Ronja**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við teimum 24 árunum. Ikki siggja so kedd út, tað verður nógv verri næsta ár.
**Marianna og Magni**



**Hey tit bæði**
Takk fyri ein góðan túr úti í Skúvoy.
**Tvey ið vóru við Annars:** Takk fyri myndina



**Góði elskaði Rógvi**
Spæl nú ein góðan. Vit gleða okkum at koma í føðingardag sunnudagin.
**Omma og abbi**



**Góða mamma, vermamma, omma og langomma**
Hjartaliga tillukku við 86 ára degnum. Takk fyri alt tú hevur verið fyri okkum.
**Ynskja Hans og Sólrun við familjum**



**Góða fitta Elin Maria**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag. Jesus pápi signi framtíð tína. Takk fyri at tú ert ein so fitt didda. Heilsan frá okkum
**Allan og Turið**



**Góðu tit trý - Karin, Hjørdis og Heðin**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 7., 10. og 15. juli.
**Heilsan systkinabørnini**


**Heilsanir**

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




## HEILSANIR



**Hey Anna Elisabeth**
Full ferð sum altíð. Nær lærir tú at slappa av? Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. 17. juli.
**Heilsan vit her heima**



**Góða Katrin**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum. Vit gleða okkum at sleppa ein biltúr. Takk fyri, at tú ert so góð við okkum.
**Marianna, Beinir og Brandur**



**Góði fitti Gullbrandur**
Tillukku við 2 ára føðingardegnum sunnudagin.
**Ynskja omma og abbi í Sandavági**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum. Takk fyri, at tú ert so góð við meg.
**Ísak**



**Góði Gullbrandur**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 18 juli.
**Omma og abbi í Havn**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum í morgin
**Ynskir Jónas**

# Com-Data nýtt andlit

**Mikudagin lat Com-Data upp í nýggjum hølum í Klaksvík. Samstundis læt deildin í Runavík eisini upp handil.**
**– Við hesum hava vit umsíðir fingið tað andlitið úteftir, vit allatíðina hava havt ætlanir um, sigur Heini Hansen sølustjóri**


KLAKSVÍK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*


Við stóru og nýggju hølunum og allari Vánni í baksýni hava starvsfólkini á Com-Data í Klaksvík fingið eitt arbeiðsumhvørvi, onnur bert kunnu droyma um. Men bæði tey og viðskiftafólkini hava eisini verið tolin. Síðani bygningurin hjá Com-Data brendi fyri góðum 4 árum síðani, hava tey 20 starvsfólkini húsast undir óvanliga trongum umstøðum. Og seinasta 1 1/2 árið, meðan byggingin hevur staðið uppá, hava viðskiftafólkini mest av øllum upplivað teldufyritøkuna sum eitt byggipláss.

– Okkara viðskiftafólk hava verið ómetaliga tolin við okkum. Men eg kann vissa tey um, at tey ikki hava bíðað til fánýtis, sigur Guttorm Sørensen deildarstjóri á Com-Data.

### Alt á sama stað

Á veghæddini húsast fyrisitingin og nýggi handilin, har fyritøkan nú eisini fær heilt nýggjar møguleikar at røkja privatkundatænastuna, sum annars hevur liðið nakað á láni.

– Hetta merkir ikki bara, at vit nú kunnu bjóða bæði privat- og vinnukundatænastu á sama stað. Við tað allar deildir nú húsast í sama bygningi, og tað harvið verður styttri millum tey ymsu liðini, er tað eyðsæð, at kundin fær eina betri tænastu í allar mátar, sigur Guttorm.

Í hesum sambandi hevur Com-Data tikið upp samstarv við Allan Joensen og Steingím Ósa, frá Omega, sum seinnu árini hava røkt størsta partin av privatkundatænastuni í Kaksvík.

– Vit hava drúgvar royndir á hvør sínum øki, so vit hildu tað vera upplagt at leggja saman, sigur Allan Joensen, sum er sera spentur uppá nýggja samstarvið.

Allan leggur afturat, at samanlegginin við Com-Data als ikki merkir, at gomlu kundarnir hjá Omega eru sleptir uppá fjall. Allar avtalur við gomlu kundarnar eru framvegis galdandi. Einasti munurin er, at Allan og Steingrím framyvir verða at hitta í hølunum hjá Com-Data.

### Tænastumiðdepil

Á ovastu hædd í nýggja bygninginum er ætlanin at leiga høli út til aðrar fyritøkur í Klaksvík. Guttorm ímyndar sær eitt heilt nýtt arbeiðsumhvørvið, har fyritøkur, ið annara onkusvegna samstarva, nú kunnu húsast undir somu lon við til dømis felags matstovu og øðrum.

– Alt virksemið í húsinum snýr seg jú um at geva kundanum eina so góða tænastu, sum møguligt. Høvdu vit so eisini fingið aðrar tænastufyritøkur inn í húsið, hevði talan veðrið um onki minni enn ein tænastumiðdepil, sum uppaftur aðrir og fleiri kundar høvdu fingið gleði av, sigur Guttorm Sørensen, sum er sera errin av nýggja bygninginum.



*Telduhandilin Omega og Com-Data hava nú lagt saman. Framyvir verða Allan Joensen og Guttorm Sørensen báðir at hitta í nýggja bygninginum hjá Com-Data í Klaksvík*


Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg